## RAKSTRARROKNSKAPUR

| Viðm. | | 2005<br>1.000 DKK | 2004<br>1.000 DKK |
|---|---|---|---|
| 1 | Rentuinntøkur | 35.973 | 34.231 |
| 2 | Rentuútreiðslur | 7.926 | 7.295 |
| | **Netto rentuinntøkur** | **28.047** | **26.936** |
| | | | |
| | Vinningsbýti av partabrøvum | 42 | 39 |
| | Kostnaðar- og provisiónsinntøkur | 1.615 | 1.808 |
| | Útreiðslur til kostnað og provisión | 128 | 136 |
| | **Netto rentu- og kostnaðarinntøkur** | **29.576** | **28.647** |
| | | | |
| 3 | Virðisjavnan av lánsbrøvum og útlendskum gjaldoyra o. ø. | -577 | -310 |
| | Aðrar vanligar inntøkur | 385 | 214 |
| 4 | Útreiðslur til starvsfólk, umsiting o.a. | 16.539 | 14.738 |
| | Avskrivingar av ítøkiligum ognum | 475 | 475 |
| | Aðrar vanligar útreiðslur | 5 | 55 |
| | Avskrivingar og burturleggingar uppá skuldarar (netto) | 2.155 | 2.212 |
| | **Úrslit av vanligum rakstri áðrenn skatt** | **10.210** | **11.071** |
| | | | |
| | Skattur | 2.051 | 2.214 |
| | | | |
| | **Hálvársúrslit** | **8.159** | **8.857** |

## FÍGGJARSTØÐA HIN 30. JUNI 2005

| Viðm. | | 2005<br>1.000 DKK | 2004<br>1.000 DKK |
|---|---|---|---|
| | **Ogn** | | |
| | Kassapeningur og innistandandi uttan uppsøgn í tjóðbankanum | 26.416 | 30.860 |
| | Ogn hjá peningastovnum o.ø. | 40.452 | 44.379 |
| | Útlán | 1.048.271 | 898.724 |
| | Lánsbrøv | 108.224 | 174.738 |
| | Partabrøv o. a. | 724 | 724 |
| | Kapitalpartar í assosieraðum fyritøkum | 15.556 | 15.596 |
| | Ítøkiligar ognir | 9.991 | 10.601 |
| | Aðrar ognir | 1.960 | 2.800 |
| | **Ogn tilsamans** | **1.251.594** | **1.178.422** |
| | | | |
| | **Skuld og eginpeningur** | | |
| | Skuld til peningastovnar | 0 | 0 |
| | Innlán | 970.432 | 914.343 |
| | Onnur skuld | 10.668 | 9.871 |
| | Burturleggingar til útreiðslur | 2.728 | 2.931 |
| | **Skuld tilsamans** | **983.828** | **927.145** |
| | | | |
| | Eginpeningur | 259.607 | 242.420 |
| | Hálvársúrslit eftir skatt | 8.159 | 8.857 |
| | **Eginpeningur tilsamans** | **267.766** | **251.277** |
| | | | |
| | **Skuld og eginpeningur tilsamans** | **1.251.594** | **1.178.422** |
| | | | |
| | **Tøl, ið ikki eru tikin við í fíggjarstøðuna** | | |
| 5 | Ábyrgdir og aðrar skyldur | 29.343 | 79.862 |



## VIÐMERKINGAR

| Viðm. | | 2005<br>1.000 DKK | 2004<br>1.000 DKK |
|---|---|---|---|
| 1 | **Rentuinntøkur** | | |
| | Renta av innistandandi í peningastovnum | 538 | 750 |
| | Renta av útlánum | 32.467 | 29.975 |
| | Renta av lánsbrøvum | 2.968 | 3.506 |
| | **Rentuinntøkur tilsamans** | **35.973** | **34.231** |
| | | | |
| 2 | **Rentuútreiðslur** | | |
| | Renta til peningastovnar | 0 | 0 |
| | Renta til innlán | 7.872 | 7.241 |
| | Renta til ábyrgdarpening | 54 | 54 |
| | **Rentuútreiðslur tilsamans** | **7.926** | **7.295** |
| | | | |
| 3 | **Virðisjavnan av lánsbrøvum og gjaldoyra** | | |
| | Virðisjavnan av lánsbrøvum | -605 | -310 |
| | Virðisjavnan av partabrøvum | 0 | 0 |
| | Virðisjavnan av gjaldoyra | 28 | 0 |
| | **Virðisjavnan av lánsbrøvum og gjaldoyra tilsamans** | **-577** | **-310** |
| | | | |
| 4 | **Útreiðslur til starvsfólk og umsiting** | | |
| | Løn og samsýning til umsjónarráð og stjórn | 816 | 790 |
| | Starvsfólkalønir | 5.321 | 4.868 |
| | Eftirløn til starvsfólk og løn til eftirlønt starvsfólk | 962 | 917 |
| | Útreiðslur til sosiala trygd | 455 | 427 |
| | **Útreiðslur til starvsfólk tilsamans** | **7.554** | **7.002** |
| | | | |
| | Aðrar umsitingarútreiðslur | 8.985 | 7.736 |
| | **Útreiðslur til starvsfólk og umsiting tilsamans** | **16.539** | **14.738** |
| | | | |
| 5 | **Ábyrgdir og aðrar skyldur** | | |
| | Aðrar ábyrgdir | 23.075 | 75.737 |
| | Kredittilsagnir, ið ikki kunnu kallast aftur | 6.268 | 4.125 |
| | | **29.343** | **79.862** |

## LYKLATØL 1. HÁLVÁR

| | 2005 | 2004 | 2003 | 2002 | 2001 |
|---|---|---|---|---|---|
| Solvensprosent | 27,1 | 28,3 | 27,2 | 30,1 | 31,8 |
| Kjarnukapitalprosent | 27,1 | 28,3 | 27,2 | 30,1 | 31,8 |
| Hálvársrenting av eginpeningi áðrenn skatt | 3,9 | 4,5 | 5,5 | 5,9 | 6,0 |
| Hálvársrenting av eginpeningi aftaná skatt | 3,1 | 3,6 | 4,4 | 4,7 | 4,8 |
| Úrslit fyri hvørja kostnaðarkrónu | 1,53 | 1,63 | 1,79 | 1,77 | 1,71 |
| Rentuváði | 1,5 | 1,3 | 2,7 | 2,5 | 3,0 |
| Gjaldoyrastøða | 0,0 | 0,0 | 0,0 | 0,0 | 0,0 |
| Gjaldoyraváði | 0,0 | 0,0 | 0,0 | 0,0 | 0,0 |
| Útlán og burturleggingar í mun til innlán | 111,3 | 101,9 | 96,2 | 92,0 | 82,7 |
| Gjaldføri yvir lógarinnar kravi | 73,9 | 148,5 | 185,0 | 248,0 | 304,0 |
| Stórir kundar tilsamans | 22,8 | 37,9 | 51,2 | 27,5 | 21,5 |
| Burturleggingarprosent | 2,9 | 3,4 | 2,9 | 3,9 | 4,1 |
| Hálvárstaps- og burturleggingarprosent | 0,2 | 0,2 | 0,0 | 0,3 | 0,5 |
| Hálvársútlánsvøkstur | 8,0 | 1,1 | 5,8 | 5,6 | 0,3 |
| Útlán í mun til eginpening | 3,9 | 3,6 | 3,6 | 3,5 | 3,3 |

# ROKNSKAPUR 1. HÁLVÁR 2005
# HJÁ NORÐOYA SPARIKASSA

Norðoya Sparikassi hevði eitt úrslit eftir skatt fyrra hálvár 2005 uppá 8,2 mió. kr. Hetta er ein minking uppá 698 t. kr. í mun til fyrra hálvár 2004, tá úrslitið var 8,9 mió. kr.

### Inntøkur

Netto rentuinntøkurnar hjá sparikassanum fyrra hálvár vóru 28 mió. kr. og er hetta ein vøkstur uppá 1,1 mió. kr. í mun til fyrra hálvár 2004, tá netto rentuinntøkurnar vóru 26,9 mió. kr.

Netto rentu- og kostnaðarinntøkurnar hjá sparikassanum fyrra hálvár vóru 29,6 mió. kr. móti 28,6 mió. kr. sama tíðarskeið í 2004. Hetta er ein vøkstur uppá 1 mió. kr.

Økta kappingin hevur havt við sær at sparikassin aftur í ár hevur javnað rentu- og kostnaðarstøðið, so vøksturin í netto rentu- og kostnaðarinntøkum stavar frá øktum útlánum samanborið við fyrra hálvár í 2004.

### Útreiðslur

Útreiðslur til starvsfólk og umsiting vóru 16,5 mió. kr. móti 14,7 mió. kr. fyrra hálvár í fjør. Hetta er ein vøkstur uppá 1,8 mió. kr. Vøksturin stavar í høvuðsheitinum frá øktum umsitingarútreiðslum og sáttmálabundnum lønum.

### Avskrivingar og burturleggingar uppá skuldarar

Avskrivingar og burturleggingar móti tapi av útlánum og ábyrgdum vóru 2,2 mió. kr., ið er á leið tað sama sum sama tíðarskeið í 2004.

### Fíggjarstøðan

Fíggjarstøða sparikassans javnvigar nú við 1.252 mió. kr. móti 1.178 mió. kr. fyrra hálvár 2004. Hetta er ein vøkstur uppá 6,2%. Innlánið er nú 970 mió. kr. móti 914 mió. kr. fyrra hálvár 2004, sum svarar til ein vøkstur uppá 6,1%. Útlánið er nú 1.048 mió. kr. móti 899 mió. kr. fyrra hálvár 2004, svarandi til ein vøkstur uppá 16,6%.

Eginpeningur sparikassans er nú góðar 268 mió. kr., og er farna árið øktur við 16,5 mió. kr., ið er ein vøkstur uppá 6,6%. Eginognin er nú 21,4% av samlaðu fíggjarstøðuni móti 21,3% í fyrra hálvár 2004.

### Gjaldføri og solvensur

Gjaldførið sparikassans er framvegis gott, og er nú 175 mió. kr. móti 250 mió. kr. í 2004. Gjaldførið er 45% av stuttfreistaðu skyldum sparikassans. Lógin krevur 15%. Av samlaðu skyldum sparikassans 17%. Lógin krevur 10%. Broytingin í gjaldførinum stavar frá, at útlánið hetta seinasta árið er vaksið munandi skjótari enn innlánið.

Solvensur sparikassans er 27,1%, í mun til 28,3% fyrra hálvár 2004. Lógin krevur 8%.

### Útlit seinra hálvár

Sparikassin væntar at úrslitið seinra hálvár verður áleið tað sama.



NORÐOYA SPARIKASSI

# ROKNSKAPUR
## 1. HÁLVÁR 2005